

*Hjá P/f Meinhardt Arge hava teir góðar royndir við ISUUS-skipanini, f.v. Regin W. Dalsgaard, stjóri á ISUUS, og Otto Andreasen frá kundamóttøkuni hjá P/f Meinhardt Arge*

# Ongin bíðitíð við tvívegis SMS-skipan

**Nú ber til at SMS´a og spyrja um tíð til at fáa bilin á verkstað ella spyrja um hann er klárur at avheinta, sigur Regin W. Dalsgaard, stjóri á fyritøkuni ISUUS P/F, ið hevur ment eina sera framkomna tvívegis SMS-skipan til bilbranchuna**

SAMSKIFTI
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nógvir bileigarar kenna til, hvussu trupult tað mangan kann vera at sleppa ígjøgnum, tá teir t.d. ringja til sín bilhandlara at biðja um tíð á verkstað, ella at spyrja um bilurin er liðugur og klárur at avheinta.

Hendan trupulleika hevur fyritøkan ISUUS loyst við at geva fyritøkunum sín egna terminal, sum líkist tí hjá Føroya Tele, sum vit kenna best frá 1441 nummarinum. Munurin er, at skipanin hjá ISUUS er tvívegis, brúkarin betalur ikki eyka fyri at samskifta við terminalin, og kostnaðurin ið fyritøkar ber er fleiri ferðir bíligari. Hetta ger, at ein og hvør fyritøka sparir munandi við slíkari loysn.

ISUUS-forritið er eitt samskifti ígjøgnum fartelefonina hjá kundanum og EDV skipanina hjá fyritøkuni. Innanhýsisparturin av ISUUS skipanini, er at starvsfólkini hjá fyritøkuni kunnu skráseta á telduni, um tey eru til arbeiðis, hava frí, ella eru eitt ørindi í býnum og senda boð ímillum teldurnar, tvs. at sjálvt um starvsfólkini eru upptikin í telefonini, so fáa tey altíð boð við vekslarin.

Skipanin kann t.d. brúkast til at spyrja um prís á bilum og eykalutum ella at spyrja um saldo á kontoini. Eisini kunnu fyritøkurnar nýta skipanina til at kunna teirra viðskiftafólk um ymisk tilboð o.l.

Tá t.d. bilurin er liðugur á verkstaðnum, verður tað tastað inn á telduna, tá so kundin sendir SMS fyri at spyrja um bilin, fær hann umgangandi svar. Hetta ger hann við at skriva nummarið á bilinum í fartelefonina og senda SMS til bilasøluna.

Tær bilasølurnar sum higartil hava ognað sær ISUUS-skipanina eru: Bilasølan v. Øssur Johannesen, P/f Reyni Service, og P/f Meinhardt Arge.

Eisini aðrar fyritøkur í Føroyum og í Danmark nýta ISUUS-skipanina, ið má sigast at vera rættiliga slóðbrótandi. Skipanin hevur verið sýnd á stórum vinnumessum í Danmark við góðum úrsliti.

Í samfelagnum í dag skal alt ganga skjótt fyri seg, kundin hevur skund, fyritøkurnar hava nógv at gera, tolsemið verður minni og minni. Vit hava luftað idéirnar við vinnulívið um slíkar rationaliseringar og vinnan hevur tikið heilt væl ímóti hesum, tí hetta er til gagn fyri kundan og fyritøkuna. Marknaðurin er búgvin til at slíkar skipanir, tí øll hava fartelefon í dag, sigur Regin W. Dalsgaard, stjóri á ISUUS.

# Trygg á leiðini

TÍÐINDSKRIV
*frá Ferðslutrygd*

"Trygg á leiðini" er heitið á nýggjum tiltaki, har allir næmingar í 1. flokki fáa hvør sín gulan endurskinsvest. Tiltakið verður gjørt í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar.

Nú myrka vetrartíðin av álvara er byrjað at merkjast, er umráðandi at fara í ljós vetrarklæði og at nýta endurskin. Og serliga umráðandi er, at børnini síggjast væl, tey eru jú tey sárbærastu í ferðsluni.

Vónin er, at skúlarnir stuðla tiltakinum og gera sítt til at børnini nýta vestarnar so nógv sum til ber. Um morgunin er myrkt hesa ársins tíð, so tá er sjálvsagt at nýta vestarnar. Men seinnapartarnar er vesturin eisini hentur, tí tað fer jú so tíðliga at skýma.

## Mercedes stjórin misti bilin



Bilurin hjá týska DaimlerChrysler stjóranum, Jürgen Schrempp, ein Mercedes-Benz S600 limousine, bleiv stolin tann 26. oktober í Stuttgart. Hóast bilurin hevur alla framkomna radarútgerð, hevur tað ikki eydnast týska politinum at finna hann

*Kelda: Motor Magasinet*

## Framleiðast í Eysturríki



Chrysler í USA hava skrivað sáttmála við Magna Steyr í Eysturríki um at framleiða Chrysler 300C sum sedan og stationcar til evropeiska og marknaðin og til Miðeystur

*Kelda: Motor Magasinet*

## Gassbilar til Gøteborg



Fiat hava selt 20 teir fyrstu Punto Natural Power til Gøteborg kommunu. Talan er um á ein ordra uppá tilsamans 200 bilar til Gatubolaget, sum stendur fyri almennu bilunum. Bilarnir hava 1,2 litur motor við 52 hk og kunnu koyra upp á bæði bensin og gass

*Kelda: Motor Magasinet*